Ítróttur

Sjálvmál avgjørdi finaluna

Steypafinala, kvinnur, 1. deild.
B36-HB 1-0 (0-0)
1-0 sjálvmál

Sunnudagin spældu tey bæði 1. kvinnuliðini hjá B36 og HB finaluna í steypakappingini.

Úrslitið av dystinum gjørdist, at B36 vann hann 1-0, og kundi harvið taka ímóti tí stóra steypinum, sum borgarstjórin Poul Michelsen handaði aftaná.

Men ikki eydnaðist B36 at vinna dystin við egnari hjálp.

Tað var nevniliga eitt sjálvmál, ið avgjørdi dystin, tá eitt korter var eftir at spæla í.

Skallaði í egið mál

Hetta hendi, tá Anja Rein royndi seg við einum langskoti móti HB-málinum.

Sigrun Mikkelsen var hægst í luftini at skalla bóltin burtur, men bólturin fór ikki burtur, men í staðin himmalhøgt upp í luftina og afturum hana móti tí tóma málinum. Har var Sigrun so aftur, tá bólturin kom niður, men hon stóð inni í málinum, tá hon gjørdi seinnu royndina at fáa bóltin burtur, og so var mál.

Annars er tað ein spurningur, um ikki málverjin hjá HB átti at havt fingið bóltin fyrru ferð við at havt rópt, men so varð bara ikki, og málið, ið avgjørdi dystin var veruleiki.

Mest verjuspæl

Um dystin er annars at siga, at hann var sum dystir flest millum havnarfeløgini bæði plaga at vera. Hann byrjaði sera varisliga, og hvørki av liðunum tordi stórt annað enn at verja.


Størsta kjansin í fyrra hálvleiki hevði B36, tá Kára Magnussen skjeyt uppum frá 5-metrinum eftir hornaspark.

Í seinna hálvleiki legði HB harðari út, og sum dystur leið, sá út til, at bert skuldi bíðast, til HB-kvinnurnar fóru at fáa mál, men so skuldi ikki verða.

Í staðin gav HB grannunum avgerandi málið, og eftir tað hevði B36 yvirtakið, men stórt meira hendi tó ikki í dystinum.

Tvey gul kort vórðu givin í dystinum. Tey fingu Vivian S. Larsen og Durita Rouch.

(hj.)



»Flekk fær eina systur« og »Hvar er Flekk?« **48,-.**

»Stóra orðabókin hjá Flekki« **86,-.**

Kappróðurin á jóansøku

Sum vanligt, vóru tað 5-mannaførini við dreingjum, ið vóru fyrst at rógva á jóansøku.

Her gjørdust ikki tær heilt stóru broytingarnar í mun til undanfarnu róðrarnar.

Tjaldrið vann, og so vóru tað Kollur, Blikur og Junkarin, ið kappaðust um næsta plássið.

Úrslitið gjørdist so hetta:

Tjaldrið
Kollur
Sílið
Junkarin
Blikur
Aldan
Hulda
Firvaldur
Ternan
Svanur
Royndin Fríða
Havfrúgvin

Næsti róðurin var við 6-mannaførum við kvinnum, og her varð tað enn einaferð nýggi strandabáturin, ið gjørdi vart við seg, hóast hann ikki vann.

Leingi sá út til, at Strálan skuldi fara at verða á odda, men í síðstu løtu áðrenn málið slapp Jarnbardur framum og vann hendan rættiliga spennandi róður.

6-mannafarsróðurin endaði soleiðis:

Jarnbardur	**5.13,03**
Strálan	**5.14,06**
Leirvíkingur	**5.16,13**
Gongurálvur	
Norðurstovu Dánjal	
Sølmundur	
Riddarin	
Lómur	
Beinta	
Fortunan	
Hulda	

Hjá gentunum umborð á 5-mannaførunum vóru tað teir báðir bátarnir úr Vágunum, Dúgvan og Ørnin, ið komu frægast frá róðrinum – saman við Sílinum úr Havn.

Sum ikki einaferð varð neyðugt við umróðri hjá gentunum, tí fyrsti starturin gekk ikki eftir vild, og mátti skjótast av.

Men sjálvt um róð varð umaftur, slapst heldur ikki undan, at okkurt ólag var á, og kom sostatt tveir av gentubátunum ongantíð á mál – teir vóru Hvassi og Erla Kongsdóttir.

Genturóðurin fekk annars hetta úrslit:

Dúgvan	**5.09,12**
Ørnin	**5.09,22**
Sílið	**5.11,06**
Báran	
Firvaldur	
Royndin Fríða	
Blikur	
Svanur	

Tey vóru ikki so fáa, sum á Sundalagsstevnuni mundu halda seg hava sæð ein eingangsróður hjá Stráluni, sum tá vann í stóru stíli við fleiri bátslongdum.

Men allur ivi varð ruddaður burtur í jóansøkuróðrinum, tá Strálan enn einaferð róði seg langt fram um hinar bátarnir, so kappingin teir seinastu 4-500 metrarnar bert var um, hvør kundi fylgja henni eftir.

Tað sá leingi út til, at Sølmundur fór at verða einsamallur nær Stráluni, men so fekk eisini hann kapping, og endin varð, at ikki so langt varð millum fremstu bátarnar hesaferð.

Róðurin endaði soleiðis:

Strálan	**7.26,08**
Sølmundur	**7.30,03**
Kollfirðingur	**7.30,24**
Gongurólvur	
Leirvíkingur	
Lómur	
Norðurstovu Dánjal	
Jarnbardur	

Í teimum róðrunum, sum higartil hava verið, hevur Kvívíkingur verið greiður vinnari, men hesaferð varð øðrvísi.

Ein orsøk kann kanska vera, at ein av føstu manningini ikki var við, men í øllum førum endaði blái báturin úr Kvívík so langt afturi sum á fjórða plássinum, meðan »rivalarnir« Argjabáturin, Knørrur og Ørvur sluppu sær framum.

Endaliga úrlsitið hjá 8-mannaførunum gjørdist hetta:

Argjabáturin	**7.16,24**
Knørrur	**7.17,10**
Ørvur	**7.17,21**
Kvívíkingur	
Gullbrandur	
Sørvingur	
Nevið Reyða	
Miðvingur	

Hóast Nólsoyingur hevur ligið í »skugganum« av Vestmenningi og Havnarbátinum í teimum báðum fyrru FM-róðrunum í ár, sást beinanvegin leygardagin, at tað var ikki ætlanin hesaferð.

Longu frá byrjan av í 10-mannafarsróðrinum spentu teir so í á Nólsoyingi, at teir rættiliga skjótt lógu fremstir, og enntá rættiliga einsamallir fremstir.

Og sum róður leið, tók Nólsoyingur seg frá hinum bátunum, og vann við fleiri bátslongdum.

Soleiðis varð úrslitið:

Nólsoyingur	**9.08,22**
Havnarbáturin	**9.14,17**
Skálabáturin	**9.15,10**
Vestmenningur	
Suðringur	
Vágbingurin	
Tvørábáturin	

Kappróðrarstøðurnar

5-mannafør, dreingir:

Tjaldrið	**21**
Kollur	**14**
Junkarin	**12**
Sílið	**10**
Blikur	**4**
Ternan	**2**
Svanur	**2**
Aldan	**1**

6-mannafør, kvinnur:

Jarnbardur	**19**
Strálan	**11**
Leirvíkingur	**11**
Gongurólvur	**10**
Norðurstovu Dánjal	**9**
Sølmundur	**5**
Lómur	**1**

5-mannafør, gentur:

Ørnin	**14**
Dúgvan	**12**
Sílið	**11**
Báran	**8**
Erla Kongsdóttir	**7**
Blikur	**4**
Firvaldur	**3**
Hvassi	**3**
Svanur	**2**
Royndin Fríða	**1**
Fortuna	**1**

6-mannafør, menn:

Strálan	**18**
Sølmundur	**14**
Leirvíkingur	**11**
Kollfirðingur	**10**
Gongurólvur	**9**
Norðurstovu Dánjal	**3**
Lómur	**1**

8-mannafør:

Kvívíkingur	**17**
Argjabáturin	**16**
Knørrur	**13**
Ørvur	**11**
Sørvingur	**5**
Gullbrandur	**3**
Miðvingur	**1**

10-mannafør:

Vestmenningur	**17**
Havnarbáturin	**15**
Nólsoyingur	**15**
Skálabáturin	**9**
Suðringur	**7**
Vágbingur	**3**

Sosialurin – fimm ferðir um vikuna!